FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 22. mars 2022
J.nr.: 22/05495-2
Viðgjørt:

Svar til skrivligan fyrispurning nr. 52-142/2021 frá Beintu Løwe Jacobsen, løgtingskvinnu, settur landsstýrismanninum í fíggjarmálum, Una Rasmussen, um MVG og brennievni.

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hvussu hevur gongdin verið við mvg-inntøkum av brennievni í februar og higartil í mars í ár?
2. Hvørjar ætlanir hevur samgongan á avgjaldsøkinum um at hjálpa húsarhaldum við at leggja um til aðrar orkukeldur enn olju til sethús?

Svar til fyrispurning nr. 1
Inntøkurnar hjá landskassanum frá meirvirðisgjaldinum á brennievni hækkar, tá ið oljuprísurin hækkar. Enn ber ikki til at siga, hvussu gongdin hevur verið í mvg-inntøkunum frá meirvirðisgjaldi á brennievni í februar ella í mars, tí skrásetingar av hesum eru ikki tøkar býtt á mánaðir. Feløg lata inn mvg-uppgerðir eina ferð um ársfjórðingin. Innlatingarfreistin og gjaldsfreistin er ein mánaður og 10 dagar eftir, at eitt mvg-tíðarskeið er endað.

Svar til fyrispurning nr. 2
Samgongan longdi við løgtingslóg nr. 19 frá 24. februar 2021 afturberingarskipanina av meirvirðisgjaldinum í sambandi við keyp av elriknum hitapumpu- og jarðhitaskipanum. Í 2022 og 2023 verður alt meirvirðisgjaldið endurgoldið. Í 2024 og 2025 verður helvtin av meirvirðisgjaldinum endurgoldið. Í 2026 og fylgjandi ár verður meirvirðisgjaldið ikki endurgoldið.

Við verandi oljuprísum og afturbering av mvg'num loysir tað seg búskaparliga hjá húsarhaldum at leggja um til hitapumpu- ella jarðhitaskipan, men hjá summum húsarhaldum kann tað vera ein avbjóðing at fíggja kostnaðin av sjálvari umleggingini, sum hevur eina afturgjaldstíð á 5-10 ár við verandi prísum. Fíggjarmálaráðið metir støðugt um, hvørt tað er neyðugt at seta aðrar skipanir í verk fyri at stuðla húsarhaldum í at leggja um til aðrar orkukeldur enn olju til upphiting av sethúsum.

Tinganes, 22. mars 2022

Uni Rasmussen
Landsstýrismaður í fíggjarmálum